# Mánadagur 11. juli



Kvinnurnar, sum vunnu trý bronsumerki í liðkappingini




Elspa Mørkøre er hóast ein skaða í økslini við til at tryggja Føroyum gull í stafettini í 50 metra frísvimjing



*Anika Vang sleppir pílinum, og hann hevur góða kós. Hon legði seg heilt fram í oddin í recurve-skjótingini*




*Ungi Kári J. á Høvdanum leypur avstað í ryggsvimjingini*




*Aksel Poulsen og Bjartur Lamhauge spæla tvímansleik ímóti Jersey. Føroyar tapa og enda sum nummar 5 í liðkappingini í badminton*



*Við hvørt vendir tað upp og niður í flogbólti, men so ræður um at fóta sær sum frægast*



*Halltóra Joensen fer fram við einari álendskari kvinnu í avgerandi dystinum um gullið*

BOGASKJÚTTARNIR hava tað ikki lætt í FITA-runduni, har tað verður skotið í nógvum vindi. Annika Vang liggur tó væl fyri hjá kvinnunum í recurve, og liðkappingunum eru bæði tey føroysku liðini fremst.

Í 800 METRA renningini kemur Jóan Karl Joensen víðari frá innleiðandi renningini. Finalan verður týsdagin.

LANDSLIÐIÐ í badminton kemur ikki víðari til hálvfinalurnar, men skal spæla um fimta pláss. Har eydnast tað at vinna báðar dystirnar, og liðið endar tí sum nummar 5.

FÓTBÓLTSKVINNURNAR seta enn einaferð harðastu kappingarneytarnar av Álandi upp á pláss. Malena Josephsen, Ása Dam á Neystabø og ein álendskur spælari gera málini, tá ið Føroyar vann 3-1.

FYRSTU heiðursmerkini á Oyggjaleikunum koma til høldar, tá ið kvinnuliðið í fimleiki vinnur trý bronsuheiðursmerki. Tær fáa bronsu á gólvinum, á hestinum og í samanløgdu kappingini.

MENNINIR í fimleiki standa seg eisini væl, og teir vinna tvey silvurmerki og eitt gullmerki í liðkappingini. Hetta er fyrsta føroyska gullmerkið í Hetlandi.

HERI ZISKA endar sum nummar fýra í hamarkasti, og Rigmor N. Arge verður aftast í renningini á 10.000 metrum.

KVINNUSTAFETTIN í svimjing vinnur gull í fýra ferðir 50 metra frísvimjing. Elspa Mørkøre, Nathalia Reinhardt, Lisbeth L. Joensen og Shaila millum Garðarnar svimja einasta gullmerkið í svimjing á Oyggjaleikunum hesaferð heim. Andras Thomsen vinnur silvur í 1500 metra frísvimjing.

MANSLANDSLIÐIÐ í flogbólti spælir tveir dystir og vinnur báðar. Bæðiu ímóti Hetlandi og ímóti Grønlandi endar tað við 3-0. Kvinnurnar vinna 3-0 á Bermuda.

LANDSLIÐIÐ í borðtennis vinnur bronsu, eftir at liðið tapir hálvfinaluna í kappingini.

MARIUS JOENSEN og Rúni Debess gerast nummar 4 í liðkappingini í skeet. Marius er næstbesti skjúttin í kappingini.